# Dreymagentan avdúkað

*Leygardagin hevði listamaðurin, høvundurin og kveikjarin William Heinesen fylt 100 ár.Nógv varð gjørt burtur úr degnum. Fríggjadagin komu bøkur út á almennari samkomu og leygardagin var avdúking av standmynd, framsýning og sjónleikur á skránni*

*Myndir: Jens Kristian Vang*



*Hans Pauli Olsen, listamaður, framanfyri minnisvarðan yvir William Heinesen*

Dagfinn Olsen

100 ár vóru 15. januar liðin, síðani William Heinesen varð borin í heim.

Og nógvar hava fyrireikingarnar verið og sigast má, at dagurin varð hildin, sum tað sømir seg. Kveikjarin, høvundurin og myndlistamaðurin varð leygardagin heiðraur við minnisvarða, bókum og sjónleiki og tónleiki og framsýning um lív og avrik.

## Kvøldseta

Longu fríggjadagin var kvøldseta í Kommunuskúlaskálanum, har 3 bøkur vórðu lagdar fram. Forlagið Fannir gav út bókina William ummælir fagrar listir. Føroya Skúlabókagrunnur gav út Stjørnuskaldið undir Varða og Bókadeild Føroya Lærarafelags gav út Veingjaða Myrkrið, sum Edward Fuglø myndprýddi.

Á kvøldsetuni kvóðu børn brot úr Sjúrðarkvæðnum. William myndprýddi í fimtiárunum skálan við myndevnum úr Sjúrðarkvæðnum. Fyri tónleiki og sangi stóðu Havnarkórið, Edvard Nyholm Debess og Teitur Lassen. M.a. Kom yrkingin »Hoyrdu tit havsins andalag« fyri 3 ferðir. Teitur og Edvard framførdu eina spennandi framførslu, har tónabúnin var nútímans. Havnarkórið sang yrkingina við lag eftir Vagn Holboe og við lag eftir H. J. Højgaard.

Bøkurnar, ið komu alment út á samkomuni, vórðu lagdar fram og brot lisin úr teimum.

## Minnisvarði

Leygardagin avdúkaði abbadóttir William, Elisa Heinesen, ein minnisvarða, sum Hans Pauli Olsen hevur gjørt.

Listafelag Føroya hevur gingið á odda við at lata minnisvarðan yvir William gera og formaður felagsins, Helgi Fossadal, fegnaðist. Hann takkaði eisini fyri stuðul og segði, at sum heild hevði ikki verið trupult at fáa til vega pening, so verkið gjørdist veruleiki.

Býráðsformaðurin í Havn, Leivur Hansen helt eisini røðu og fegnaðist um minnisvarðan. Skaldið Heðin M. Klein helt eisini røðu.

Síðani varð farið í Listaskálan, har Havnar Hornorkestur framførdi Norsku Løvu eftir William Heinesen.



*Næmingar kvøða brot úr Sjúrðarkvæðnum. Aftan Fyri mynd*



*Abbadóttir William Heinesen avdúkar minnisvarðan. Pápin Zacharias og formaður Listafelagsins, Helgi Fossadal, hjálpa til*

## Framsýning

Klokkan 16 lat framsýningin Heima á foldum upp. Ein framsýning, ið Kgl. Bókasavnið og Landsbókasavnið hava fyrireikað. Gunnar Hoydal hevur verið ein høvuðsmaðurin vegna Landsbókasavnið. Signar á Brúnni helt røðu og setti framsýningina. Kristina Hansen las yrkingina Heima á foldum og Nicolaos Kapnas spældi bratchvariatiónir hjá Williami Heinesen yvir gamalt føroyskt sálmalag.

Á kvøldið var frumsýningin av leikinum Móðir Sjeystjørna, sum Egi Dam hevur flutt á pall eftir bókini hjá Williami Heinesen.

Stórur áhugi var fyri heiðranini av skaldinum og Útvarpið sendi beinleiðis frá tiltøkunum. Sjónvarpið hevði samandrátt sunnukvøldið.

## Dreymagentan

Eftir stendur skaldskapurin framvegis. Afurat er komin ein minnisvarði yvir fjølbroytta listamannin William Heinesen. Ein minnisvarði, ið fólk tykjast á einum máli um, ímyndar hug og verk Williams. Hans Pauli hevur funnið gentuna í klippi eftir Willam. Á steininum, ið gentan stendur á, er skuggamynd av Willaim og av spælimanninum, iðflest øll kenna frá myndum Williams.

Kanska er hetta ein dreymagenta, ið Wiliam klipti aftur og aftur. Eisini kann tað vera ein av teimum, ið hann skrivar um!

Jú nógvar vóru metingarnar. Bæði frá listarmanni og áskoðarum.

Har hon stendur, dreymagentan, ber til at skoða niðan á húsini hjá Lisu og William Heinesen, har smáttan hjá Williami eisini stendur. Tárnið á heimsins enda, har hann sat og skrivaði alheims skaldskap.

Eisini kann skoðast yvir Havnina, har William vaks upp, fekk íblástur og har søgurnar og søgupersónarnir liva.





*Formaður Listafelagsins, Helgi Fossadal, heldt røðu, tá minnisvarðin yvir William Heinesen varð avdúkaður*



*Teitur Lassen og Edvard Nyholm Debess hava sett nýggj løg til yrkingar hjá Williami Heinesen*



*Býráðsformaðurin í Havn, Leivur Hansen, á framsýningini Heima á foldum*



*Havnarkórið sang á kvøldsetuni fríggjakvøldið*



*Bøkurnar, ið komu alment út á samkomuni, vórðu lagdar fram og brot lisin úr teimum*




*Framsýningin Heima á foldum lat upp leygardagin*

# Prógv í teldufrøði

## *Fimm kanditatar hava lokið BS-prógv í teldufrøði við Ålborg Universitet, men teir hava lisið í Føroyum*

Dagfinn Olsen

Longu fyrst í sjeytiárunum var data á skránni á Fróðskaparsetrinum. Tað seinasta í hesi menning er, at fimm kanditatar í teldufrøði fríggjadagin fingu prógv. Teir hava lisið við Ålborg Universitet, men hava tó verið í Føroyum og hava m.a. fingið fjarundirvísing.

Á samkomu fríggjadagin hildu hesi røðu: Hans Pauli Joensen, vararektari, Jørgen Østergaard, docentur við Ålborg Universitet, Niels Christian Nolsøe, stjóri á Elektron, Vilhjálmur Gregoriussen, umboð fyri næmingar.

Øll vóru samd um, at samstarvið hevði verið gott og at tað er sera neyðugt, tí vinnuni tørvar teldukøn fólk.

Jørgen Østergaard helt í áhugaverdu røðu síni fyri, at vert er at leggja sær í geyma, at útbúgving hoyrir ikki longur bert ungdóminum til, men er neyðug alt lívið.

Næmingarnir fegnaðust um, at stríðið nú ber ávøkst, tí strævið hevur tað verið.

Eisini vóru teir takksamir um, at arbeiðsplássini høvdu givið teimum møguleikar, so hetta var gjørligt. Og somuleiðis takkaðu teir familjum, ið hava havt tol hava stuðlað.

Stjórin í Elektron segði í hesum sambandi, at fyritøkan eisini framyvir fer at stuðla fólki, ið tekur útbugving, tí trot er á teldufrøðingum í øllum ríkinum



*Jørgen Østergaard og Allan Dresling, Ålborg Universitet,Randi Dam Petersen, Egil Helmsdal, Vilhjálmur Gregoriussen, Frants Olsen, Sámal Christiansen, teldufrøðingar og rektarin á Fróðskaparsetrinum, Malan Marnersdóttir* **Mynd: Jens Kristian Vang**